# Óarbeiðsføris-tryggingl

BANK**NORDIK**

### Óarbeiðsføristrygging

Vit bjóða tær at víðka tína Bólkalívstrygging ella Restskuldartrygging til eisini at fevna um Óarbeiðsføristrygging, og sum sostatt kann tryggja tær eina mánaðarliga skattafría inntøku, so leingi óarbeiðsføri varar, tó í mesta lagi til tú verður 67 ár.

### Hvør kann tekna Óarbeiðsføristrygging ella Restskuldartrygging?

Tryggingin fyri óarbeiðsføri verður teknað sum ískoyti til eina Bólkalívstrygging ella til eina Restskuldartrygging. Tað er tí ein treyt fyri at tekna tryggingina fyri óarbeiðsføri, at tú eisini hevur Bólkalívstrygging ella eina Restskuldartrygging frá BankNordik við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi 575.000 kr. Tað er ein treyt fyri at fáa hesa trygging, at tú ert millum 18 og 51 ár og kanst útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Harumframt er tað ein treyt, at tú hevur eina virkna Eftirlønarkontu í BankNordik, haðani tryggingargjaldið verður goldið.

### Prísur og tryggingarupphæddir

Gjaldið verður skuldskrivað mánaðarliga.

| | |
|---|---:|
| Árligt skattafrítt útgjald | 92.900 kr. |
| **Tryggingargjald um mánaðin** | **338,16 kr.** |

### Útgjald

Óarbeiðsførisveitingin verður útgoldin, um arbeiðsførleiki tín verður skerdur til ein triðing ella minni innan 60 ára aldur. Óarbeiðsførisveitingin verður útgoldin, tá ið arbeiðsførleikin hevur verið støðugt skerdur í 3 mánaðir. Goldið verður hvønn mánað frammanundan. Útgjaldið heldur uppat, tá ið tú hevur endurvunnið arbeiðsførleikan til omanfyri ein triðing ella í síðsta lagi, tá ið tú fyllir 67 ár.

### Skattur

Tryggingargjaldið verður goldið av tíni Eftirlønarkontu og verður tí skattað, tá ið tað verður inngoldið. Hetta merkir, at útgjøld fyri óarbeiðsføri eru skattafrí.
Neyvari útgjaldstreytir eru at finna í tryggingartreytunum fyri Bólkalívstrygging.

BankNordik

Telefon 330 330
kundi@banknordik.fo
www.banknordik.fo